## Bókasøla í Miðlon

Nú tað stundar til jólar letur ein bókasøla upp í Miðlon í Havn. Her verður møguleiki at síggja eitt forvitnisligt bókaborð, og haraftrat er møguleikin at keypa onkra bókagávuna at leggja undir jólatræið. Á hesum bókaborðum eru bert føroyskar bøkur við kristligum innihaldi. Eisini eru nakrar forvitnisligar fløgur at keypa. Ágóðin av hesi bókasøluni fer til tey toymini, sum Heimamissiónin fer at senda til Kambodja komandi summar at virka saman við lokalu samkomunum. Jólasølan í Miðlon letur upp í dag, og er opin fram til 19. desember.




# Minnið um eitt listaverk fingið skap

**Listarliga »Ringrásin« hjá Oggi Lamhauge er fullgjørd, nú bókin og seinasti liðurin í verkinum er komin sum minnið um verkið, ið einaferð var**

LIST
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*






*- Eg havi altíð verið hugtikin av at síggja, hvussu alt doyr og livnar aftur í eini ævigari ringrás, sigur listamaðurin Oggi Lamhauge, sum hevur lagt enn ein lið afturat »Ringrásini« við nýggju bókini*

Mong mundu undrast, tá listamaðurin Oggi Lamhauge 1. juni í 2007 kom inn á Kunningarstovuna í Gamla Bókahandli við einum bakka við frískum grasbøkkum. Bøkkarnar legði hann á gólvið í einum skulpturellum skapi, tók eina mynd av teimum og lat teir vera liggjandi.

Sum frá leið gekk tað upp fyri fólki, at hetta var byrjanin til sermerktu listarligu »Ringrásina« hjá listamanninum. Tí tá juni mánaður leið móti endanum, kom Oggi Lamhauge inn aftur, fór avstað við bøkkunum og kom aftur við einum bunka av mosa, sum fekk pláss á gólvinum 1. juli 2007.

Soleiðis helt listamaðurin á í eitt heilt ár. Í sptember mánað hevði hann eina stóra rúgvu av eplum við sær, fyrst í mars kom hann við longum slintrum av tara - hvørja ferð eitthvørt lívrunnið tilfar, sum hann bar út aftur í náttúruna, har hann hevði tikið tað. Bøkkarnar koyrdi hann til dømis aftur til Søldarfjarðar.

### Æviga ringrásin

12 mánaðir seinni var rúmið í Kunningastovuni tómt, og eftir vóru bara myndirnar. Men Oggi Lamhauge var ikki heilt liðugur. Fyri at fullgera ringrásina og varðveita minnið um listaverkið, sum einaferð var, fór hann undir at savna myndirnar í eini bók. Í bókini hava fýra føroyskir yrkjarar fingið hvør sína árstíð at skriva yrkingar til. Men hóast ringrásin soleiðis nú er fullgjørd, endar hon ikki her, tí við yrkingunum sprettir nú nýggj list úr myndunum sum ein byrjan, til enn eina ringrás. Ella sum Ingeborg Bugge, listfrøðingur, skrivar í innganginum:

»Við hesum fyribils seinasta taki megnar Oggi Lamhauge hegnisliga at snara lívsins ringrás av nýggjum. Tað er ikki bara æviga afturkoma lívsins, men listarinnar«

- Eg havi altíð verið hugtikin av at síggja, hvussu alt doyr og kemur aftur í eini óendaligari ringrás, har »onki nýtt er undir sólini« sum Prædikumaðurin og Nietzsche filosofera yvir, sigur Oggi Lamhauge.

Men onkursvegna lagrar alt seg kortini í okkara minni og verður til eina felags mentan, minnir Oggi Lamhauge á.

Tað er eisini her, bókin fær sín serliga leiklut sum dokumentatión av einum minni, sum kann liva víðari í komandi ættarliðum - kanska sum ein ímyndandi máti hjá menniskjum at læra av tí, sum er farið, hugleiðir listamaðurin.

### Øðrvísi landslagslist

Ein annar tanki við verkinum er at vísa vanlig ting í einum øðrum samanhangi, so vit fara at hugsa um tey av nýggjum. Til dømis setir tað nakrar heilt aðrar tankar í gongd, tá vit sígga ein bunka av eplum á gólvinum í Gamla Bókahandli, enn tá vit sita og flysa tey við døgurðaborið. Soleiðis verður týdningurin av gerandisfyribrigdum eisini kveiktur av nýggjum í ringrásini hjá listamanninum.

- Hetta er kanska eisini ein annar máti at spæla sær við landslagslist í føroyskum høpi, tí heldur enn at mála náttúruna, hava eg flutt hana inn í eitt rúm, har hon lutvís fór í upploysn, sigur Oggi Lamhauge og vísir á, at í so máta leggur verkið seg tætt at sonevndu Land Art listini, ið er ein listastílur, sum stavar frá 1960'unum.

- Land Art listafólkini skaptu síni verk úti í náttúruni og fluttu so at siga listasøvnini út í landslagið, greiðir Oggi Lamhauge frá.

Við at lata verkini fara í upploysn, var hetta eisini máti at provokera okkara vanligu fatan av listaverkum, sum nakað, sum skal varðveitast og ansast væl eftir.

### Nýgg list

Nú »Ringrásin« er fullgjørd og minnið um verkið er komið út í bók, hava vit samstundis fingið eina røð av nýggjum yrkingum og tekstum frá fýra av okkara yrkjarum og rithøvundum. Til at skriva tekstirnir hevur Oggi Lamhauge valt Oddfríða M. Rasmussen, Sigrið Gaini, Petur Pólson og Rakel Helmsdal.

- Eg vildi hava tvey mannfólk og tvey konufólk, sum eru á leið á mínum aldri, so okkara tíðarseting í ævigu ringrásini er á leið tann sama. Men fyrst og fremst valdi eg tey, tí mær dámar væl tað, tey skriva, og tí tey eru rættiliga ymisk sum listafólk, sigur Oggi Lamhauge, sum heldur tað vera sera áhugavert at lesa teirra tulkingar av verkunum og árstíðunum.

Millum annað skrivar Oddfríður M. Rasmussen soleiðis um Desember

**»STAÐUR/ÓSTAÐUR**

grund í rúmlendi sipar til
ólátað umfar máað burtur í
sorgtungari bylgju millum
havlýdna ógerð«

Og soleiðis halda tekstirnir í bókini á í eini ringrás, sum kanska einaferð kveikir upaftur aðra list í enn eini listarligari ringrás.



*SEPTEMBER: »Eplir«: Ein bunki av eplum á gólvinum í Gamla Bókahandli setir heilt aðrar tankar í gongd, enn tá vit sita og flysa tey við døgurðaborið*